## DAGSINS MEINING

# Ein góð hugsjón

Ferðslutrygd hevur nú sett eitt tiltak í verk, ið nevnist "0-hugsjónin". Endamálið við hesum tiltaki er, at eingin skal doyggja og eingin skal koma álvarsliga til skaða í ferðsluni. Tá ein hugsar um, hvussu nógv, ið doyggja í ferðsluni í Føroyum og hvussu nógv, ið koma til skaða, so kann tað tykjast mestsum vónleyst at seta slík mál.

Hinvegin hevur støðan nú í mong ár verið so álvarsom, at okkurt heilt munagott nú má gerast fyri at økja um ferðslutrygdina. Tað er tí púra beint at seta fram ein tílíka hugsjón. Og vit noyðast øll at trúgva, at tað ber til, tí gera vit ikki tað, so ber neyvan til at røkka hesum høga máli at eingin skal doyggja í ferðsluni.

Hetta at fáa deyðsvanlukkurnar niður á nul, er eitt gott og avgjørt neyðugt mál. Hetta er eitt mál, sum allir føroyingar uttan iva taka undir við. Nú verður so rikin ein kampanja til tess at røkka hesum máli. Í hesum høpi hava vit øll eina stóra ábyrgd. Allir partar eiga at gera sítt besta til tess at røkka nul-hugsjónini. Ferðslutrygd, løgregla, vegamyndugleikar, koyriskúlar, skúlar og dagstovnar, foreldur og almenningurin sum heild. Hetta er avgerandi neyðugt, tí vit kunnu ikki longur liva við øllum teimum mongu vanlukkunum í ferðsluni.

Vit hava her í Føroyum í áravís talað og skrivað um allar ferðsluvanlukkurnar og teir sorgarleikir, ið standast av teimum. Ásannast má, at ov lítið er hent á økinum og vanlukkurnar koma aftur og aftur. tað hevur einki endamál at trætast um, hvør ið hevur ábyrgdina av, at so lítið er hent. Nú tykist sum avvarandi myndugleikar av álvara eru farnir til verka. At byrja við at seta sær ein 0-hugsjón sum mál er sjálvsagt og eiga vit øll at stuðla hesi hugsjón og at gera okkara besta til tess, at henda hugsjón kann gerast veruleiki.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Heilsan til Ólav Hátún

**Poul Michelsen**



Loyvdi mær herfyri at gera nakrar viðmerkingar um føroyskan fótbólt og um Gundadal. Greinin sigur rímuliga væl frá tí sum eg havi at siga um hetta mál, og havi tí - sum so - onki at leggja aftrat.

Ólavur hevur meira enn nakar annar brúkt hvørt høvi til at gera vart við sína ónøgd við tað, sum vit gera á Tórsvølli. Sjálvsagt hevur Ólavur rætt til at hava eina aðra raðfesting av hvat føroyskur fótbóltur eigur at fáa í føroyskum ítróttarhøpi.

Í so máta er onki nýtt í greinini hjá Ólavi - munurin er tó hesaferð, at greinin er so ógvusliga orða, at orsøk er til at halda, at argumentir ikki longur røkka.

Greinin er skeiv fyri ein stóran part og leggur mær nakað í munnin, sum eg als ikki havi sagt ella meini.

Greinin, sum eg skrivaði í seinastu viku havi eg fingið nógvar positivar reaktiónir uppá. Hon var væl meint og eftir øllum at døma væl móttikin.

At Ólavur ikki er so fegin um greinina, havi eg noterað mær, men vit kunnu ikki vera samd øll. Tí hesar viðmerkingar:

"At eg kom inn í projektið sum ein annar geykaungi og tveiti allar býarlistamenninar, sum høvdu lagt sál og orku í málið, burtur úr reiðrinum……" sigur Ólavur

Til hetta er at siga, at tá íløgurnar til byggibúgving, spreinging og laging var eg sjálvur býráðsformaður og kendi rættuliga væl grundarlagi undir ætlanini, og var tí á ongan hátt í fremmandum umhvørvi. Vit vóru fleiri, sum bendu málið inn á rætt, og ikki bert eg og ein listinlærdur lógarkønur - sum Ólavur so fittur skrivar.

"At eg sjálvandi eri greiður yvir, hvønn veg tað ber, og tað er væl eisini tí, at eg á a la Brixtofte leggur á tann ógvin, at nú skal skapast hotell-, banka- og søluvirksemi á okkara einaferð so lovandi frítíðar- og ítróttarøki í Gundadali…….. sigur Ólavur

Til hetta er at siga, at á heimasíðini hjá Tórsvølli www.torsvollur.fo ber til at síggja eina skitsuætlan, sum vísir hvat virksemi kann sampakka við eitt framtíðar alheims fótbóltsstadion.

Ólavur eigur at gera sær greitt, at júst hetta sama virksemi var í projektinum hjá "býarlistamonnunum" hjá honum. Hetta ivaleyst av somu orsøk sum hjá okkum. Nevnliga ein royna at endurvinna tær íløgur í konstruktión, gólv- og vegg fermetrar og fundamentir, sum eitthvørt stadion krevur.

"At eg við at beina fyri tí góðu ætlanini leggið upp til klandur og illstøðu í staðin fyri at semju og samanhald um hetta góða mál ….. sigur Ólavur

Til hetta er at siga, at Ólavur og eg hava hvør sína fatan av hvat er rætt at gera í Gundadali. Ólavur er ivaleyst av teirri fatan, at bert HANN fær sín vilja - eitt stadion við rennibreyt, hotelli, banka- og søluvirksemi - so var onki stríð - so vór øll glað.

Hetta er at undirmeta tey nógvu, sum hava somu áskoðan sum vit nevnliga :

- at tað er rætta raðfestingin at byggja ein alheims fótbóltsvøll í Gundadali.
- at tað er rætta mótvegis heildarnýtsluni av Gundadali.
- at tað er ikki er rætt at tvinna eitt fótbóltsstadion og eitt stadion til frælsan ítrótt saman.
- ***at tað rætt at frælsur ítróttur fær sítt egna øki.***
- at talan ikki er um eina privata ætlan hjá mær og um eina harmusøgu, men um eina verkætlan, sum er teknað av serkønum fólki, og sum eisini kemur at geva Gundadali og Tórshavnar Býið sóma.

# Onnur útgáva av telduorðabók

**2. óbroytta útgáva av donsk-føroysku orðabókini verður nú at fáa**

ORÐABÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Tann danska-føroyska orðabókin, sum Føroya Fróðskaparfelag gav út í 1995, og sum Hjalmar P. Petersen ritstjórnaði saman við Mariusi Staksberg, er nú komin á fløgu.

Tann teldutøka útgávan av orðabókini hevur ikki verið at fingið hendur á hesa síðstu tíðina, og tí gjørdi Orðabókagrunnurin av at geva bókina út á fløgu. Hon verður at fáa í handlunum í næstum, og kostar fløgan 340 krónur




**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Fýra bøkur frá Bókadeildini

**Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út fýra bøkur**



BARNABØKUR
*Tíðindaskriv*

Smábarnabøkurnar Ein glaður grísur og Ein fittur fílur eftir Colin & Jacqui Hawkins, barnabókina Samson & Roberto I: Arvurin eftir Rin-Tin-Tei, farbróður eftir Ingvar Ambjørnsen, og Dóttir Skammarans eftir Lene Kaaberbøl, ið er til størri børn.

Ein glaður grísur og Ein fittur fílur eru tvær fittar bøkur, sum tú kanst brúka at spæla tær saman við barninum. Í bókunum eru hol, sum tú kanst stinga fingrarnar ígjøgnum, so grísurin letur við halanum, fílurin við sevlinum, haran við oyrunum og so framvegis. Bøkurnar, ið eru væl egnaðar til tey 0-2 ára gomlu, eru 10 blaðsíður hvør, prentaðar á haldgott papp. Tær kosta kr. 39 í bókabúðunum.

Samson & Roberto er fyrsta bókin um vinmenninar báðar, Samson, ein ógvuliga ljótan hund, og Roberto, ein listinlærdan og svangan frens. Lívið er fátæksligt og keðiligt, til postboðið ein dagin kemur við einum brævi, har tað stendur, at Samson hevur arvað ein farbróður, hann onki visti um. Eftir hetta broytist alt... Bókin, sum er væl egnað til tey 8-9 ára gomlu, er stuttlig, frálíka væl myndprýdd av Per Dybvig við tekningum á nærum hvørjari síðu. Alexandur Kristiansen týddi úr norskum.

Samson og Roberto I: Arvurin eftir Rin-Tin Tei, farbróður er 94 síður, innbundin og kostar kr. 130 í bókabúðunum.

Dóttir Skammarans eftir Lene Kaaberbøl er fyrsta bókin av fýra um Dinu. Hesar bøkur eru millum tær mest seldu í Norðurlondum í dag.

Dina er dóttir Skammarans. Skammarin hevur tær gávur, at fólk, ið hyggur í eyguni á henni, kunnu ikki lúgva um, hvat tey hava gjørt – hvørki fyri sær sjálvum ella øðrum. Tí er javnan boð eftir mammu Dinu, tá ið brotsmenn, ið ikki vilja viðganga, skulu avhoyrast. Dina hevur arvað eyguni á mammuni, so tað er lætt at ímynda sær, at tað er ikki lætt hjá henni at fáa onnur børn at spæla við seg.

Malan Háberg týddi úr donskum. Dóttir Skammarans er 215 bls., og kostar kr. 150 í bókabúðunum.

# Færri fiskimenn eiga fiskin

**Hóast svensku myndugleikarnir vilja varðveita útróðurin fram við allari strondini, verða fiskirættindini støðugt savnaði í økinum við Gøteborg. Eisini í Danmark eru tað tey størru skipini, sum vinna í kappingini um tilfeingið**



FISKIRÆTTINDI
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Norska blaðið, Fiskaren, skrivar, at ein fjórðipartur av virðinum av svenska fiskarínum fer til útróðrarmenninar.

Tað er stríð millum ynski um at varðveita útróðurin og tað, at savna veiðuna á færri hendur, sigur Staffan Larsson, verkætlanarleiðari í svensku fiskivinnuumsitingini.

Í løtuni viðger Ríkisdagurin framtíðar útróður í Svøríki, har sterkt ynski er um at varðveita hetta slagið av fiskiskapi við eitt nú lokalum kvotum. Men hóast tað, fer kortini fram ein støðug miðsavnan av fiskarínum við Gøteborgleiðina.

Danska fiskivinnuumsitingin hevur eingi tøl, sum vísa býtið millum útróðurin og tey størru skipini. Tó verður roknað við, at útróðrarbátar fiska 10% av samlaðu veiðuni.

Í heyst boðaði danska umsitingin fyri landbúnað og fiskivinnu frá, at hon vil styrkja útróðurin og stuðla smáu fiskivinnuplássunum. Men enn sæst einki ítøkiligt úrslit av hesum.

Í hesum døgum fáa danskir fiskimenn møguleika at søkja upphøggingarstuðul. Kravið er, at skipið er longri enn tíggju metrar.

John Kjærsgaard í danska fiskivinnustýrinum sigur, at bátar undir tíggju metrar eru eingin hóttan fyri fiskatilfeingið, og tí er eingin orsøk at taka teir úr flotanum.

Í nærmasta grannalandi okkara, Íslandi, er lítið eftir av útróðrarvinnuni, samstundis sum fiskiloyvini eru miðsavnaði.

Her heima siga flestu politikarar seg ræðast hesa gongd og vilja varðveita útróðrarflotan, sum - umframt at vera eitt búskaparligt íkast - eisini hevur ein sosialan týdning.

Nógv hevur verið tosað um at gera eina einfaldari skipan, sum ger tað lættari hjá útróðrarmonunum at fornýggja síni vinnutól. Eisini hevur verið talan um at lata smábátar fiska frítt.

Livst so spyrst.


## Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000 **72.000** | **Opel Astra 1.4** grønur, árg 1996, 3 hurðar, km. 116.000, *sýnaður: 30/01/03* **56.000** |
| **Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000 **67.000** | **Opel Astra 1.6 16V** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 52.000 **112.000** |
| **Peugeot 306 XR 1.4** reyður, árg 1999, 5 hurðar **89.000** | **Opel Astra 1.6 16V** hvítur, árg 1996, 4 hurðar, km. 119.000 **64.000** |
| **Peugeot 306 DT 1.9** gráur, árg 1995, 4 hurðar, km 205.000 **46.000** | **Opel Vectra 2.0 DT Station Car** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000, sýn 24/03/04 **95.000** |
| **Peugeot 406 2.0 Hdi v/aircon** vínreyður, árg. 1999, 4 hurðar, km. 132.000, fyrr 145.000 **nú 125.000** | **Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000 **155.000** |
| **Peugeot Expert Combi 2.0 Hdi 110 HK, 8 sitipláss** bláur, árg 2003, 4 hurð., km. 19.000 **259.000** | **Toyota Camry 1.8** bláur, 4 hurðar **20.000** |
| **Peugeot 406 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 63.000 **130.000** | **Citroen Berlingo 1.8 MS v/ aircon** grønur, árg 1999, 4 hurðar. km. 90.000 **90.000** |
| **Peugeot 605 SRDT 2.1 aut** bláur, árg 1994, 4 hurðar, Verður seldur við brotnum gearkassa **15.000** | **Citroen Xantia 2.0 Hdi Station Car** grønur, árg 2000, km. 110.000, *sýnaður: 19/03/04* **148.000** |
| **Opel Agila 1.2** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- **nú 95.000** | **Ford Escort 1.8** bláur, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 **59.000** |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 84.000 **68.000** | **Hyundai Accent 1.5 Aircon** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km 92.000 **89.000** |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin 341800

